# Talent: Vit hava ymiskar gávur

**Nú kann hin gløggi, hin snildi og hin hepni sita við sama borð. Og allar talentirnar koma til sín rætt**

SPÆL
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Nýggja føroyska borðspælið, Talent, er fyri vaksin børn og barnslig vaksin*

Í ítrótti og tónleiki verða talentini ofta umrødd. Mangul uppá talentir, røkt av talentum, at finna tey røttu talentini. Uttanlands hava teir talentspeidarar, menn og kvinnur, sum fara til alskyns ítróttartiltøk, fyri at vita, um ikki onkur bóltsnillingur er at finna. Hilnast væl hjá t.d. einum ítróttarfelagi, so verður tosað um eina "Talentfabrik". Fabrikkin liggur kanska í Kina, men hesuferð er Talent´ið at finna í Føroyum. Nýggja spælið hevur fingið sítt snið og skap í Klaksvík. Eitt frískligt nýbrot seinastu árini er, at vit hava fingið føroysk spøl. Fyrst fingu vit Landastrok, síðani komu Kánus og Manna. Landastrok er tengt at almennu vitanini um fosturlandið. Kánus er tengt at málinum, og Manna er tengt at Halgubók. Talent er tað higartil breiðasta spælið, sum er upphugsað í Føroyum. Spælið tekur útgangsstøðið í Føroyum, og higani fer ein til grannalondini.

## Áhugin drívur spæligleðina

Tað er áhugin og ynski um at læra nakað, og at menna seg, sum drívur hugin hjá teimum, sum hava keypt Talent. Og sum ger, at tey spæla tað upp til fleiri ferðir um vikuna. "Spælið hevur selt javnt og samt um alt landið." sigur ein annar av stigtakarunum, Palli Ziskason. Palli hevur víst spælið fyri fremmandafólki. Bæði norðmenn, póllendingar og týskarar gjørdust sera forvitnir, og hugtiknir av spælinum. Hin stigtakarin, Steintór Rasmussen veit eisini at siga frá kinverjunum, sum hava framleitt spælið, at teir halda tað verða sera forvitnisligt og hugvekjandi. Palle heldur, at kinverjarnir vóru so hugtiknir av spælibrettinum, sum symboliserar bláa havið og kuldan. Heimasíðan hjá Talent hevur eisini havt nógvar vitjanir, úr øllum Evropa, og eisini úr Fjareystri. Men tey, ið vitja á heimasíðuni, eru primert føroyingar.

## Ansni og dugnaskapur

Ein av mongum lærdómum í Talent, er at tey sum spæla við í spælinum, læra at rutta við tí peninginum tey hava. Man krevur at disponera peningin rætt. Hepnið spælir eisini inn, sum tað jú eisini ger í veruliga lívinum. Eins og í veruliga lívinum, so kann onkur, ið er ribbaður fíggjarliga í spælinum, velja at fara til skips fyri at koma undan aftur. "Timing og netverk hava eisini týdning her" leggur Steintór dent á. Tað er týdningarmikið hjá einum Talent-liði at síggja dygdirnar hjá hvørjum øðrum. Spælið leggur upp til klassisku bíblisku meginreglina, at ein nýtur tær gávur ein hevur fingið. Stigtakarnir leggja eisini dent á, at tey ynska at menna sjálvsálitið hjá teimum, ið spæla Talent. Tí verður ikki bara buldra út við tungvektara-spurningum. Fólk, sum eru stinn innan tankar, logikk, tekning og at evna koma eisini til orðanna í Talent. Stigtakarnir hava greitt pedagogiskt frá reglunum, so eingin skal misskilja teir. Palli og Steintór vóna eisini, at spælið kann verða ein íblástur til kjakið um Pisakanningina.

## Ferðast eftir vali

Meðan farleiðin er rættuliga bundin á øðrum spælibrettum, so er ferðafrælsið størri á Talent-spælibrettinum. Londini, sum figurera á spæli-brettinum, eru londini, sum Føroyar hava mest samvinnu og samhandil við. Spurningarnir, sum verða spurdir í spælinum eru úr Grønlandi, Íslandi, Bretlandi, Noreg, Svøríki, Finnlandi, Danmark, Týsklandi, Týsklandi og Føroyum. Lagt er upp til, at tey sum spæla Talent býta seg upp í lið. Ein litríkur terningur hoyrir til spælið. Er ein so heppin, at terningurin vísir eitt flogfar, so kann ein fara til ein høvuðsstað eftir egnum vali. Fellur luturin á eitt skip, so kann liðið sigla eftir teimum bláu linjunum á spælibrettinum. Eisini í hesum førinum ger liðið av, hvørt tey fara til Íslands, Noregs, Danmarkar ella til Bretlands. Fellur luturin á bilin, so kann liðið koyra innanvert landamarkið. Í Føroyum millum Klaksvík og Tórshavn. Fjórði møguleikin er, at terningurin vísur eina stjørnu. Tá skal liðið taka eitt kort úr bunkanum, sum nevnist "Stjørnuskot" og fylgja boðunum. Liðið sleppur ikki at ringla um aftur, tá tað fær stjørnu. Annars sleppa liðini altíð at ringla um aftur, tá tey svara rætt ella loysa ásettu uppgávuna.

## »Flaggspurningar«

Ein lítil felagsnevnari er við "Matador", nevnliga eitt byrjunnarfæ. Hvørt liðið fær 64 gyllin tá spælið byrjar. Er liðið komið fram til t.d. Bretlands, so fær liðið ein sonevndan "Flaggspurning". Her skal liðið svara einum spurningi um eitthvørt forvitnisligt í Bretlandi. Verður svarað rætt, so setur liðið oljutilfeingið í ein av sínum haldarum, og tey seta á tilfeingismerki við Aberdeen. Hetta merkir so, at liðið eigur oljuna í Bretlandi. Tá so hini liðini vitja Aberdeen skulu tey gjalda eitt ávíst gjald til liðið, sum eigur oljuna í Aberdeen. Hvørt liðið skal royna at savna teir seks bókstavirnar í T-A-L-E-N-T. Nú renna tennirnar í vatn hjá onkrum spælihugaðum. Men ráð er fyri tí. Allir spælireglarnir eru at finna á www.talent.fo. Men ein er best tæntur við at keypa spælið sjálv/ur. Tó er møguligt at spæla eina netútgávu á www.talent.fo

## Ikki fastar katagoriir

Steintór Rasmussen sigur, at grundhugsanin við spælinum er, at tað ikki skal verða eitt spæl við føstum katagorium. Ein fær avbjóðingar, í mun til tað landið ein kemur til í Talent-spælinum. Ein hevur eisini møguleikan at ferðast har, sum vitanin hjá einum er. Um ein t.d. er sterkur innan norsk viðurskifti, so velur ein at fara tann vegin. Umframt hetta, er eisini talan um eitt spæl, sum opnar fyri teimum kreativu evnunum. At ein skal læra at síggja ríkdóm og tilfeingið. Ein skal eisini læra at fáa nakað burtur úr virðisbrævamarknaðinum. Virðini í Talent liggja í somu londunum, sum tey liggja í veruliga Heiminum. Bilídnaðurin liggur eisini í Týsklandi, Træídnaðurin liggur eisini í Finnlandi o.s.fr. "Talent er ikki eitt uppslagsverk. Men vit hava fingið inn í spælið; áhugaverdar spurningar, gátur og avbjóðingar." sigur Steintór.

## Góð samvera

Kappingarelementið er sjálvsagt í Talent. Men idealið fyri spælið er góð samvera, samanhald, og ein góður liðandi. Men eins og í fótbólti, so kunnu luttakarnir leggja støði eftir tørvi. Stigtakarnir fáa eisini afturmeldingar frá fólki, sum bæði hava tað sum ein hugnaliga kapping, og øðrum sum ganga hægri uppí kappingina. Heldur spælið fram á sigursferð sínari kring landið, er ikki óhugsandi, at stigtakarnir koma við nýggjum spurningum og avbjóðingum. Tá er spælibrettið jú longu tøkt í fleiri heimum. Men Palli og Steintór vóna, at tey kunnu gerast fleiri enn. Við hetta lag verður eingin føroyingur Talent-leysur.